## DAGSINS MEINING

# Klaksvíkin á Føroyakortið

Hetta er tað, ið rennur tær til hugs eftir sera vælfyriskipaða og væleydnaða Summarfestivalin í Klaksvík í viku-skiftinum. Tað er ikki fyri at seta niður á norðingar, tí sjálvsagt hava teir leingi verið ein týðandi partur av Føroya-kortinum, men hesaferð eydnaðist tað so eisini at leggja lunnar undir eitt afturvendandi tónleikatiltak, sum ikki fer at standa aftanfyri hvørki G!Festival, Listastevnu og onnur afturvendandi stevnutiltøk aðrastaðni í landinum.

Hetta var møguliga ein spurningur um at taka ein tjans – at váða nakað – um at leypa út í tað, tí ikki var lætt at koma aftaná væleydnaða GFestivalin, sum dróg til sín tús-undatals ungfólk úr øllum landinum. Og nærum samtíðis sum mong góð tónleikatiltøk vóru á skránni á Lista-stevnuni í høvuðsstaðnum. Ein kundi av røttum bera ótta fyri, at hetta skuldi enda sum ein fiasko, nú tað kann vera so ringt at endurtaka eina succes á øðrum festivali.Onkur man hava spurt seg sjálvan, um tað ikki var við at koma inflatión í festivalar og stevnur, ja um marknaðurin ikki varð mest sum troyttur, mettaður!

Men gakk. Treiskið er fólkaslagið, og gott. Fiskivinnupláss burturav og hevur tað lagt nógv gott í beinið. Og hví skal plássið, sum hevur fostrað so mangar góðar tónleika-bólkar, staðið, har tjóðarbólkur føroyinga, sum hevur skapt so nógvar góðar og vakrar sangir, Frændir, hevur røtur sínar, ikki eisini eiga eitt sjálvsagt pláss á festivalpallinum!

Summarfestivalurin er komin fyri at verða. Sjálvandi kann ein altíð seta eitt spurnartekin við, um tað er ov seint at halda slíka tónleikastevnu beint áðrenn skúlarnir byrja aft-ur – um ikki dampurin tá er farin av øllum eftir eitt langt summar! Úrslitið hevur so jarðað henda iva. Gamaní, veð-urgudarnir vóru til vildar, í hvssu er annan dagin. Men við nøvnum sum Hensley, Boney M, Frændum, Hanusi, Gunnari, Guðruni og kendum gospelnøvnum hava fyri-reikarnir víst, at teir eiga bæði vilja og hegni til at fylla ein festivalkarm út. Tað gekk eisini sum smurt at skifta millum tveir pallar.

Men fyrireikararnir hava so eisini dugað nakað annað: at skipa ein festival, sum byggir brýr millum ættarlið og sam-felagsbólkar. Við at geva gospeltónleiki pláss á festivalin-um hevur tiltakið eisini fingið eina savnanadi uppgávu. At stóri pallurin koma at standa miðskeiðis millum fleiri andaligar deplar í býnum mundi vera av tilvild, men ein út-legging kann so vera tann savnandi uppgávan, sum tón-leikur kann fáa millum ymsar samfelagsbólkar.

Tað kom so eisini til sjóndar, hvussu stóran týdning pen-ingastovnur norðinga, Norðoyar Sparikassi hevur fyri mentanarlívið á plássinum. Leygarmorgunin var skipað fyri stórfingnum morgunmatarborði í sambandi við 85 ára dagin hjá stovninum. Kanska hetta skuldi verið fastur tátt-ur á festivalinum. So Eyðfinnur hevur fingið nakað gott at hugsa um.

Samanumtikið ein festivalur til UG. Nú er at finna kanska uppaftur meira spennandi nøvn til næsta festival. Góða eydnu og tillukku. Føroyar hava fingið enn ein festival. Klaksvíkin er enn einaferð komin á Føroyakortið.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Jenis er ótrúligur

**Edvard Joensen**
*formaður Føroya Blaðmannafelags*



Tað er staðfest, at tað er Jenis av Rana, løgtingsmaður, sum leggur føroysk tíðindafólk undir at hata Ísrael. At hann í lesarabrævi í bløðunum um vikuskiftið roynir at leggja hetta út sum, at tað er formaðurin í Føroya Blaðmannafelag, sum hevur sett hetta uppáhald fram, prógvar bara, at løgtingsmaðurin fer lætt um sannleikan.

Tað er prófvast, at tað var Jenis av Rana, sum í Útvarpi Føroya varð endurgivin fyri at siga, at føroysk tíðindafólk sum heild hava lagt seg eftir at hata alt, sum hevur við Ísrael, USA og George Bush at gera.

Tað er beinleiðis lygn, at so er. So er tað sagt.

Í eini roynd at tosa seg burtur úr hesi óhepnu støðu, hann kom sær í, roynir Jenis av Rana, so góðum líkt, at geva øðrum skuldina. Hesaferð formanninum í Blaðmannafelagnum, sum vegna tíðindafólkini talaði at hesi skuldseting hansara.

Men hann vevur ymiskt uppí, sum undirrritaði ikki rættiliga skilir. Til dømis tilboð mítt, sum hann ikki tekur av. Veit meg ikki hava givið honum nakað tilboð.

At fáa eina átalu frá felagsformanninum til at gerast til eina skuldseting móti felagsins limum, kann bara ein persónur, sum ikki virðir sannleikan, fáa at bera til. Men tað roynir Jeins av Rana so í hesi óhjálpnu roynd síni at koma sær burtur úr hesi býttu støðu, hann kom sær í.

Tað er ikki neyðugt at fara til Útvarpið at fáa vátta, hvat Jenis av Rana segði við útvarpsmannin, sum hann nú leggur undir at hava endurgivið seg skeivt.

Undirritaði kannaði nágreiniliga hjá Útvarpinum, áðrenn viðmerking varð gjørd, hvat sagt varð.

Hvørji púra óviðkomandi fólk, útvarpsmaðurin skuldi vart, so Blaðmannafelagsformaðurin ikki slapp at leggjast á tey, eigur Jenis av Rana at greina nærri.

Kjarnin og tann »itiligi« sannleikin í hesum máli er, at bara tú kanst blanda Várharra og eitt rímiliga stórt mál av religión upp í tað, tú tekst við, er einki óført. Tú kanst mestsum føra teg fram, sum tær listir. At kalla eingin torir at mótmæla av ótta fyri at verða lagdur undir heiðinskap, og at mótarbeiða Kristusi og Ísrael. (Nú seinast eisini USA og George Busch).

Hinvegin verður ikki fírt fyri at brúka Várharra til at føra seg fram í verðsligar maktgirnd. Og Guð náði tann, sum talar at, hóast nógv eru, sum vilja. Grundin til, at tey ikki gera tað, er tann sama oman fyri nevnda.

Men tað verður hervið gjørt. Eisini í framtíðini. Og eg kann vissa Jenis av Rana um, at so mikið væl eru vit báðir, Várharra, at hetta tekur hann mær ikki illa upp.

Høvdu fleiri enn færri minst til at givið keisaranum sítt og Várharra tað, sum hansara er – og hildið tað atskilt, tá tað er neyðugt – stóð kanska ikki verri enn illa til.

# Takk fyri, Gerhard!

**Bill Justinussen**



Tað gleddi meg at lesa grein tína, hóast yvirskriftin ikki var serliga innbjóðandi. Vit eru báðir samdir um, hvat lands-stýrismaðurin eigur at gera í málinum um lítla Petur. Eg veit, hvussu trupult tað kann vera sum landsstýrismaður at sita við høvdinum fullum av góðum ráðum frá øllum síðum fyri síðani at skula taka eina avgerð. Tí legði eg heldur harðliga út eftir Javnaðarflokkinum, sum undanfarna valskeið rópti almikið upp um familjupolitikk. Og tað skal eisini verða sagt hart og týðiliga, at eg als ikki hevði teg í huganum, tá eg nevndi Javnaðarflokkin, tí tú hevur alt tað, eg kann koma í tankar um, verið fyrimyndarligur í tínum tingarbeiði.

Øll vita, at Javnaðarflokkurin talar fyri tí góða samfelagnum, samfelagið fyri øll, og tí var mín grein ætlað sum ein vekingarklokka. Føroyar eiga eisini at vera eitt samfelag fyri lítla Petur. Tí eri eg so sera harmur um, at landsstýrismaðurin, sum annars hevur gjørt eitt gott arbeiði á nógvum økjum, júst í hesum málinum hevur givið skarvin yvir. Um ein fundur okkara millum kann flyta nakað, eri eg fúsur til tað saman við tær, Gerhard. Tí hetta snýr seg ikki um at veiða atkvøður, men um at gera sína skyldu sum andstøða. Um vit politikkarar skulu halda okkum burtur frá slíkum málum, tí vit eru bangnir fyri at verða skuldsettir fyri atkvøðujakstran, so kunnu vit ongantíð gera nakað, tí allar okkara gerðir verða mettar sum slíkar.

Samanumtikið haldi eg, at tín grein sýnir, at vilji er til at loysa hetta málið á ein virðiligan hátt, og tað eigur tú tøkk uppiborna fyri.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Eitt flogfelag á Føroyaleiðini - ein stórur vansi fyri ferðafólk og flutning loftvegis framyvir

**Johan Dahl**
*løgtingsmaður*



Tað kom als ikki sum nakað sjokk, tá Mærsk Air kunngjørdi, at teir høvdu avgjørt at niðurleggja føroyleiðina, sum teir hava røkt í 30 ár, og hava vit føroyingar nógv at takka hugsjónar- og undangongumonnunum Lars Larsen og Hugo Fjørðoy fyri, at teir slóðaðu fyri hesum ferðingarmøguleika fyri okkum føringar.

Vit teirri miðvísu kappingaravlaging, sum vit hava sæð er farin fram á føroyaleiðini, har »flótandi prísir« og »Open skyes« tvs. frí kapping er ein býur í Kina, kundi ikki væntast annað enn tað, sum nú er hent, - tíverri.

Tað at kapping er á einuhvørjum vinnuligum øki er bara til frama fyri brúkaran, óansæð í hvørjum høpi hetta fer fram vinnuliga sæð.

Tí er tað eisini eitt sera stórt afturstig fyri flogferðsluna til og frá Føroyum, at vit nú aftur hava monopolstøðu á hesi flogleið.

Hvørjum hava vit at takka fyri hesa støðu?

Vinnuliga kundi sæð út til, at vit her hava uppført okkum sum reinir »rasistar« har »okkara« flogfelag hevur havt allar sømdir frá myndugleikum okkara , tí sum einasti partaeigari so er sjálvandi umráðandi at felagið hevur lív lagað - misskil meg ikki, tað ynska vit øll - men tað má og skal verða eftir vanligum vinnuligum prinsippum at eitt alment flogfelag má rekast.

Hvat kann beinleiðis almenni stuðulin um árið roknast at verða??

Tað almenna hevur subsidierað Atlantic frá føðingini inntil dagin ídag:

Hangarur bleiv bygdur fyri góðar 60 milliónir í 1990 - og ongin leiga goldin fyrr enn fyrstu ferð fyri 2-3 árum síðani, og er hendan góðar Kr. 200 túsund um árið

Um Atlantic sjálvt skuldi forrentað hesa íløgu, so hevði hon kostað ikki undir 8 milliónir um árið.

Partapeningurin uppá 75 milliónir hevur ikki fyrrenn seinasta roknskap latið nakra forrentning av sær. Sparingin fyri felagið hevur gjøgnum nógv ár á rakstarsíðuni verið upp á minst 5 millónir um árið helst meira - tí um ikki íleggjarin, sum í hesum sambandinum er landið, ikki kann fáa ein forrentning av hesi upphædd uppá meir enn 5% p. a. so er tað ikki gott nokk.

Sparingin fyri Atlantic Airways er ikki eina krónu undir 13 millinónir um árið.

So kunnu vit føringar og politikarir annars tosa um burðardygd, fría kapping og stuðulsfría vinnu so galið sum vit vilja.

Um so er, at álagt hevur verið og er almennum stovnum helst at bookað seg inn á føroyska felagið, so er hetta heldur ikki í tráð við vanligar kappingartreytir.

Tað kundi verið áhugavert at fingið eina uppgerð yvir, hvussu tær almennu loftvegis ferðaútreiðslunar eru deildar millum feløgini bæði, sum hava flogið uppá Danmark hesi seinastu 15 árini.

Hvat er so framtíðar ætlanin viðv. flogferðsluni og og kostnaðunum?

Ringt er at spáa um, hvat nú fer at henda við kappingini sum bleiv burtur og avloyst av monopolinum aftur, men tað er at vóna, at onkur annar í nærmastu framtíð fær loyvið at flúgva hesa farleið saman við Atlantic, so vit aftur fáa kapping og tá vónandi fría kapping.

Sambært stjóranum í Atlantic, so hækkar prísurin ikki, - men hvat so við eini lækking kundi ein spurt? - kundi tað ikki komið upp á tal fyri t. d. teir opnu ferðaseðlarnir, sum ídag kosta góðar 5000 krónur fyri retur ferðaseðil Føroyar/Danmark

Tað er ein heilt órímiligur prísur at krevja fyri hesa farleið, og vil eg hervið vinarligast heita á leiðsluna á Atlantic um at taka í egnan barm og fáa gjørt nakað við hendan okursprís ongantí ov skjótt.

Sera bíligu ferðaseðlakostnaðirnir kring allan heimin tala annars fyri seg, hvat átti at verið prísstøðið her hjá okkum við longstu farleið uppá ca. 2 tima ferðing frá Vágunum.

Áhaldani tjóðarogn ella frítt sum Súlan?

Vit mugu eisini gera upp við okkum sjálvi, um Atlantic Airways áhaldandi skal verða almenn ogn ella seljast til privatar áhugaðar íleggjarar.

Tað eigur politiskt at verða viðgjørt og avklárað skjótast møguligt.

### Flogvallastøðan - útbygging

Verandi støða hvat viðvíkur flogvøllinum er ikki haldbar og eigur at verða tikin í størsta álvara av øllum innvolveraðum pørtum.

Tað má og skal verða fingin ein loysn á flogvøllinum saman við donsku myndugleikum, viðv. útbygging og harvið øktum møguleikum framyvir, flogfeløgunum, vinnuni, landið og fólkið at gagni.

Mín skepsis við einum einsamallum felag enn einaferð at røkja flogrutuna til meginlandið, skal ikki skiljast sum eg havi nakað ímóti Atlantic Airways, tvørturímóti eg ynski teimum alt gott og blíðan byrð, men tað má og skal verða skipað eftir marknaðarøkonomiskum kappingartreytum og ikki planbúskaparligum treytum, og ivist eg heldur ikki í, at tað er tað sum leiðslan í felagnum eisini vil hava framyvir, felagnum at gagni, so tað frítt sum Súlan kann breiða sínar veingir út í heim í fríari kapping við onnur flogfeløg.

# Tíðindaskriv um Aberdeen-ferðina 12. - 19. juli 2004

Eftir at foreldrabólkurin "Kom og dansa fyri ung" hevði skipað fyri dansiskeiðum við dansilærarum úr Aberdeen á fleiri skúlum, á stovnum og fyritøkum í Tórshavnar Kommunu í januar mánaða í ár, hevur foreldrabólkurin "Kom og dansa fyri ung" sent ein ungan mann til Íslands fyrr í vár at læra til ungdómsdansiinstruktør. Ætlanin er at ung skulu læra onnur ung ymiskar dansihættir.

Umframt varð skipað fyri einum seriudansi við 7 ungum av Skálafjørðinum, sum dansaðu ein sokallaðan "drug-dance". Hesin snúði seg um rúsevni og negativan ágang frá javnaldrum. Í juli mánaða bjóðaði foreldrabólkurin "Kom og dansa fyri ung" trimum ungum úr Margarinfabrikkini, 14, 15 og 16 ára gomlum á intensivt dansiskeið á City Movies/Lemon Tree, Summer School of Aberdeen, høvuðsstaðurin í skotska landspartinum Grampian.

Undirvíst varð frá morgni til seinnapartin mánadag til fríggjadag við teimum allarnýggjastu dansihættunum, s.s. serium o.ø. dansiframførslum við royndum, framúrskarandi koreografum, sum vóru komin ymsastaðni frá úr Onglandi.

Umframt hesi trý ungu úr Føroyum var eitt umboð fyri foreldrabólkin "Kom og dansa fyri ung" og eitt hjálparfólk frá Margarinfabrikkini/virkishús fyri børn og ung í Havn við á vikuferðini. Á ferðini var tað foreldrabólkurin "Kom og dansa fyri ung", ið var vertur. Byrjað varð at fyriskipa dansiskeiðið longu í marts mánaða. Leitað varð eftir gisting fyri ein sámuligan prís í bløðunum, og ein føroyingur uttanlands í Aberdeen var okkara útleigari fyri ta vikuna í friðarligum umhvørvi uml. 10 min. frá miðbýnum. Flogferðin millum Vágar og Aberdeen aftur og fram var við Atlantic Airways eisini fyri ein sera sámiligan prís.

Tey ungu vórðu heintað á flogvøllinum og koyrd beinleiðis inn á dansiskeiðið, meðan tey vaksnu vórðu koyrd til íbúðina, har tey fingu íbúðina í rættlag fyri okkum fimm, ið skuldu húsast saman í heilar 7 dagar. Vit ótu morgunmat saman hvønn morgun í íbúðini, og ótu eina heita máltíð úti í býnum, sum foreldrabólkurin "Kom og dansa fyri ung" rindaði fyri.

Umframt ferðina, skuldi foreldrabólkurin "Kom og dansa fyri ung" gjalda fyri dansiskeiðini hjá teimum 3 ungu føroyingunum, ið luttóku, og fyri onkrar útferðir í Aberdeen s.s. skoytibreyt, biograf og bowling, sum var í Codonas stuttleikaparkini beint við ta longu sandstrondina.

Vit gingu nógv í Aberdeen, brúktu Hop on og Hop off bussar av og á fyri at síggja annað enn sjálvan miðbýin.

Dansiskeiðið endaði við dansiframførslu tann 5. dagin, har tey ungu í Føroyum kundu bjóða tveimum áskoðarum við ókeypis til framførsluna. Vit vóru 4 føroyingar, ið vóru áskoðarar, og eftir framførsluna vóru vit øll samd um, at hetta var ein frálíka væl frágingin framførsla. Føroyski luttakararnir vórðu heiðraðir á ein serligan hátt av Lord Mayor, og hann handaði tveimum hvør sína T-shirt við Aberdeen merkinum á.

Ætlanin er at bjóða fólki at síggja dansiframførsluna á stórskíggja, væntandi í Margarinfabrikkini í næstum.

Høvuðsstuðlar hesuferð eru: Aberdeen grunnurin, Atlantic Airways, Útleigarin í Aberdeen og ikki minst Morag Donald v/fam. í Aberdeen.

# Føroysk gransking í tíðarritinum »Science«

**VÍSUND**
*Tíðindaskriv*

Fríggjadagin 13. august hevði tíðarritið "Science", sum verður mett millum tey fremstu vísindatíðarrit í heiminum, eina grein, sum m.a. bygdi á føroyska gransking. Greinin, sum hevði heitið »Already the Day After Tomorrow?«, viðger kanningar av streymunum, sum reka fram við Føroyum. Hesir streymar hava stóran týdning fyri veðurlagið um okkara leiðir og eisini fyri jørðina sum heild. Tí er stórur áhugi millum altjóða granskarar at kanna teir, og Fiskirannsóknarstovan hevur í nógv ár mátað streym kring Føroyar í samstarvi við granskingarstovnar í nógvum ymsum londum.

Greinin í Science hevur fingið heitið eftir filminum »The Day After Tomorrow«, sum helst fleiri munnu hava sæð ella hoyrt um. Hesin filmur vísir eina ræðumynd, sum ikki hevur nógv við veruleikan at gera; men hann byggir tó á ein veruligan trupulleika. Nakrir serfrøðingar óttast fyri, at dálking kann fáa streymarnar kring okkum at vikna í hesi øldini. Um hetta hendir, so fær tað óivað avleiðingar fyri veðurlagið um okkara leiðir. Ikki so, at vit skulu vænta eina ístíð, sum filmurin leggur upp til; men partar av Norðureuropa kunnu fara at kólna nakað og serstakliga økini um okkara leiðir. Hetta hevur sjálvandi stóran áhuga; men serfrøðingarnir eru ikki samdir um, hvussu trúligt tað er, at streymarnir fara at vikna. Tí eru mátingar av streymunum so umráðandi. Tær kunnu vísa broytingar, um tær koma, og greinin samanfatar í stuttum tær mátingar, sum eru gjørdar. Mátingarnar vísa týðiliga, at broytingar hava verið, og nakrar av mátingunum benda á viknandi streym; men samstundis síggjast aðrar broytingar, sum kunnu styrkja um streymin. Tí ber ikki til, sum er, at siga, hvussu gongdin verður. Bogi Hansen á Fiskirannsóknarstovuni hevur skrivað greinina í Science saman við trimum øðrum granskarum úr Noregi, Týsklandi og Skotlandi.